# Treytaleyst krav frá politikarum at Strandferðslan siglur aftur beinanveg

**Skipini hjá Strandferðsluni skulu í sigling aftur beinanvegin og verður tað neyðugt, skal Løgtingið gera tað**

ARBEIÐSSTEÐGUR OG SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Gamli Smyril sleppur hevur ikki siglt, tí arbeiðssteðgur er. Samstundis fær Strandferðslan heldur ikki gjørt nýggja Smyril siglingarkláran so leingi arbeiðssteðgur er*

Skipini hjá Strandferðsluni skulu í sigling aftur og tað skal vera beinanvegin.

Tað krevja politikarar nú.

Og teir siga, at finna Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið ikki útav at finna eina semju so at Strandferðslan fær undantak frá arbeiðssteðginum, so verður neyðugt at Løgtingið leggur uppí og lóggevur fyri, at skipini sigla aftur beinanvegin.

Tveir tingmenn, sum nú vilja hava ein enda á tí, at Strandaraskipini liggja, nú arbeiðssteðgur er, eru Hendrik Old og Johan Dahl, báðir samgongutingmenn úr Suðuroy.

Báðir siga, at tað er tað eitt ófrávíkiligt krav, at siglingin hjá Strandfersðluni verður tikin uppaftur alt fyri eitt.

Og í dag verður so uppskot lagt fyri tingið um at longja tann partin av sáttmálanum ímillum Starvsmannafelagið og Fíggjarmáláráðið sum hevur við manningarnar hjá Strandferðsluni at gera. Hinvegin verður onki gjørt við verkfallið annars.

### Strandferðslan skal sigla aftur beinanvegin

– Eg eri púra samdur í, at skipini skulu í sigling aftur, sama hvussu tað verður gjørt, sigur sigur Hendrik Old.

Hann sigur, at hetta er ein spurningur um at yvirliva vinnuliga og tað mugu vit taka í allarstørsta álvara.

– Vinnan er hart fyrispent og slíta vit høvdið av hønuni, sum verpir gulleggini, er liðugt. Og sum støðan er nú, verpir hønan ikki nógvar dagar afturat.

– Sostatt mugu øll fyrivarni leggjast til viks, tí skipini mugu í sigling aftur og tað má vera nú.

Hann sigur, at fer vinnan fyri bakka, er tað ein vanlukka, tí kreftirnar at byrja av nýggjum eru neyvan til staðar úti um landið og vit hava ikki nógvar dagar at leypa uppá.

– Tað má halda uppat, at framleiðslan í somu økjum kring landið ferð eftir verður løgd lamin tí arbeiðsósemju eru her og har og tí tekur hann fult undir við kravinum um, at siglingin skal byrja aftur beinanvegin, antin so ella so.

Ein annar samgongutingmaður úr Suðuroy, Johan Dahl, er púra samdur.

– Tað er eitt treytaleyst krav frá okkum tingmonnum í útjaðaranum, at skipini hjá Strandferðsluni fara aftur í sigling beinanvegin, sigur hann.

Hann sigur, at tað, sum fer fram nú, skal steðgast og so mugu tey stig takast, sum eru neyðug at taka fyri at fáa skipini í sigling aftur.

– Støðan er heilt vanlukkulig og hetta kunnu vit ikki liva við. Á meginøkinum gongur alt sína vanligu gongd, men útjaðarin bløðir ferð eftir ferð og hetta er ikki at liva við, hvørki hjá vinnuni ella hjá privatfólki.

– Skipini eru lívæðrin hjá okkum úti um landið og hon má og skal ikki kvettast av.

– Tí mugu Fíggjarmáláráðið og Starvsmannafelagið finna eina semju við brestin, ella má løgtingið lóggeva fyri at skipini koma aftur í sigling, sigur Johan Dahl.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sigur, at politiskt hevur tað fremstu raðfesting, at partarnir sjálvir finna eina semju og tí má ein politisk uppílegging avgjørt at vera seinasti útvegur.

– Men vit mugu staðfesta, at føroyska samfelagið er óivað eindømi, tá ið hugsað verður um arbeiðssteðgir og tað er ikki nøktandi, sigur landsstýrismaðurin.

– Sandoy og Suðuroy eru vinnuliga veik og hetta er steinur omaná byrðu og tí kann hetta gera, at vinnuliga teppið verður rykt undan hesum økjum, hóast tey ongan lut eiga í ósemjuni.

Bjarni Djurholm heldur, at tað eru nøkur øki í samfelagnum, sum hava so stóran týdning, at tey eiga ikki at vera umfatað av einum arbeiðssteðgi og samferðslan er eitt av teimum økjum.

– Hetta kann seta stór, samfelagslig virði í vága og tað kunnu vit ikki lata okkum lynda, sigur hann.

Løgmaður ásannar, at hetta er ein stórur trupulleiki hjá vanligum fólki, men ikki minst er hetta darvandi fyri vinnuna, sum missur pening og ikki fær lagt til rættis. Støðan darvar eisini íløgum í hesi øki í landinum, tí íleggjarar vilja hava støðug viðurskifti.

– Hetta eru ikki umstøður at bjóða vinnulívinum, staðfestir løgmaður.

# Løgtingið tvingar skipini hjá Strandferðsluni aftur í sigling

**Løgtingið er kallað saman í morgun at viðgera siglingina hjá Strandferðsluni við tí fyri eyga at fáa skipini í sigling aftur við lóg**

ARBEIÐSSTEÐGUR OG SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skulu skipini hjá Strandferðsluni í sigling aftur, hóast arbeiðssteðgur er.

Tað skal løgtingið nú syrgja fyri við lóg.

Løgtingið er kallað saman í morgun klokkan 10 og tá fer tað at viðgerða eitt uppskot frá landsstýrinum um at longja tann partin av sáttmálanum ímillum Starvsmannafelagið og fíggjarmáláráðið, sum hevur við manningarnar hjá Strandferðsluni at gera.

Landsstýrið segði í tíðindaskrivi í gjár, at nú arbeiðssteðgur er, og stóru strandfaraskipini liggja, er høvuðsæðrin til partar av útjaðaranum kvett.

– Borgarar og vinna, sum hava sjóvegin sum einastu farleið, hava í løtuni onki nýtiligt og trygt flutningssamband við meginøkið og eru sostatt – enn einaferð – avskorin frá restini av landinum.

Landsstýrið vísir á, at næstan hvørja ferð, arbeiðssteðgur er, rakar tað farleiðirnar til Suðuroynna, Sandoynna og Norðoyggjar. Arbeiðssteðgurin orsakað av ósemjuni millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmáláráðið hevur aftur kvett regluliga sambandið til áðurnevndu øki. Hetta hevur svárar avleiðingar fyrst og fremst fyri fólkið, men eisini fyri vinnuna í hesum økjum.

– Fólk, sum mugu ferðast, verða noydd at fara við smábátum um hesar vandamiklu firðir. Hetta er alt annað enn trygt hesa ársins tíð, mangan í myrkri og óveðri.

Landsstýrið heldur tað tí vera alneyðugt at tryggja, at hesin partur av útjaðaranum ikki í órímiligan mun, verður darvaður av arbeiðssteðginum.

Tí fer landsstýrið at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið um at endurnýggja sáttmálan millum Fíggjarmáláráðið og Starvsmannafelagið fyri tey, sum sigla við skipunum hjá Strandferðsluni.

Hetta verður gjørt fyri at fáa skipini aftur í sigling, so skjótt sum til ber.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður Starvsmannafelagsins, hevði onga viðmerking til málið, áðrenn blaðið fór til prentingar í gjár.

Sum vit greiddu frá í Sosialinum í gjár, ætlar landsstýrið annars í næstum at taka stig til at finna eina varandi loysn, so strandfaraskipini ikki verða løgd, hvørja ferð arbeiðssteðgur er.

## Eivør á DVD

Eitt sjónvarpslið hevur ferðast við Danmarks Radios Big Band á konsertferðini við Eivør, hetta lið var ikki við í Føroyum, men tók alla konsertina í Operahúsinum upp. Ætlanin er, at upptøkurnar verða nýttar til ein DVD útgávu, ið Big Bandi gevur út.

Aftan á konsertina spurdi sjónvarpsliðið áskoðarar, um hvat teimum dámdu konsertina, og um tey skuldu velja eitt djór sum Eivør var, hvat djór tey so valdu. Enn er ikki greitt nær DVD'in kemur út.

**nud**

## Hugnakvøld fyri eldri

HUGNAKVØLD
*tíðindaskriv*



*Týskvøldið í komandi viku verður skipað fyri hugnakvøldið á Klaksvíkar Bókasavni*

Aftur í ár verður skipað fyri hugnakvøldi fyri eldri á Klaksvíkar Bókasavni. Hugnakvøldið verður týskvøldið 25. oktober kl. 19.30.

Hesaferð verður tað Erling Poulsen, sum fer at siga frá bókum sínum Mangt er millum himmal og jørð og Meiri er millum himmal og jørð.

Í bókunum eru frásagnir frá eldri fólki, sum greiða frá ymsum yvirnátúrligum, ið tey hava upplivað ella hava hoyrt frá øðrum.

Bøkurnar hjá Erlingi Poulsen hava verið sera væl umtóktar, og í løtuni er hann í holt við at savna tilfar til eina líknandi bók afturat.

Hetta kvøldið verður eisini kaffi og køkur at fáa.